## Honda flogfør til Evropa

Honda Motor Company framleiða umframt bilar, motorsúkklur og skutarar eisini framkomnar robottar og flogfør. Nú víðka teir sítt virksemi í Evropa við at koma á evropeiska marknaðin við lítla forrætingsflogfarinum HondaJet. Síðan 2006 hava Honda selt nógv av hesum flogførum í Norðuramerika.




# Til Føroyar at arbeiða uttan fyri lóg og rætt

**Í Arbeiðarafeløgunum staðfesta tey, at summir útlendingar, ið eru komnir til Føroyar at arbeiða, eru uttanfyri allan lóg og rætt**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Útlendingar, sum koma hendavegin at arbeiða, fáa ikki altíð tey rættindi, sum føroysku starvsfelagarnir, ið eru limir í fakfelag, fáa og tað kann kosta teimum dýrt*

Summir av teimum útlendingunum, ið eru komnir til Føroya at arbeiða, eru uttan fyri allan lóg og rætt.

Tað staðfestir Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað eru nú tveir mánaðir síðani, at nýggja útlendingalógin kom í gildi sum ger tað munandi lættari at fáa ES borgarar til Føroyar at arbeiða.

Í Sosialinum í gjár vistu vit at siga, at higartil hava 20 føroyskir arbeiðsgevarar søkt donsku útlendingatænastuna um alment loyvi at fáa útlendska arbeiðsmegi úr ES londunum til Føroyar at arbeiða.

Higartil eru 14 umsóknir avgreiddar og hinar seks er undir viðger.

Hendan góðkenningin gevur arbeiðsgevarunum rætt at fáa útlendingar higar at arbeiða, uttan at søkja um nýtt loyvi í hvørjum einstøkum føri. Men treytin er kortini, at arbeiðsgevararnir skulu í hvørjum einstøkum føri boða útlendingatænastuni frá, hvørjir útlendingar teir taka í arbeiði og, hvussu leingi teir skulu vera her.

Samstundis skulu teir binda seg til at tryggja útlendingunum 30 tíma arbeiðsviku og teir skulu eisini arbeiða eftir føroyskum sáttmálum.

Hetta sigur sostatt onki um, hvussu nógvir útlendingar eru komnir higar at arbeiða higartil.

### Uttanfyri lóg og rætt

Vit hava spurt fakfelagsleiðarar, hvørjar royndir teir hava at støðuni, nú útlendingalógin hevur virkað í tveir mánaðir.

Bæði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag og Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, eru samd um, at higartil hava tey ikki merkt so nógv til nýggju útlendingalógina.

Men tey eru eisini samd um, orsøkin til at so lítið hevur verið at frætt um støðuna, er, at hægsta feriutíð hevur verið og at virksemið tí eisini verið avmarkað.

Men Ingeborg Vinther staðfestir kortini, at í Føroya Arbeiðarafelag hava tey fingið at vita, at summir arbeiðsgevarar í fáa útlendingar hendavegin, geva teimum ikki somu rættindi, sum teir føroyingar hava, sum eru limir í fakfeløgunum.

- Summir av útlendingunum eru ikki skipaðir í nøkrum fakfelag, tí tað vil arbeiðsgevarin ikki og sostatt eru teir uttanfyri alla lóg og allan rætt, sigur hon.

Hon sigur eisini, at tey hava dømi um, at útlendingar verða bidnir framum føroyingar, tí arbeiðsgevarin hevur skyldu at tryggja útlendinginum 30 tíma arbeiðsviku.

- Tað ger, at útlendingarnir verða bidnir til arbeiðis fyrst, tí kravið er, at teir skulu hava minst 30 tímar, men hvat viðvíkur føroyingum er onki slíkt krav og tí koma føroyingarnir at sita heima, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Hetta sama staðfestir Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

- Hesar báðar fyrstu mánaðirnar, útlendingalógin hevur verið í gildið, hevur trupulleikin ikki verið so stórur.

Men hann kennir eisini til tað, at arbeiðsgevarar ikki vilja hava, at arbeiðsfólkið eru limir í fakfelag, og hetta rakar í serligan mun útlendingar.

- Tey, sum ikki eru limir í fakfeløg, fáa heldur ikki eftirløn og tey fáa heldur ikki trygging útgoldnað í sambandi við álvarsliga sjúku og tað eru slakar 80.000 krónur, sum talan er um. Tey avvarðandi fáa ikki lívstrygging við deyða og har er talan um einar 300.000 krónur. Somuleiðis eru eisini børnini hjá limunum eisini tryggað.

- Alt hetta missa arbeiðsfólk, sum eru ikki eru limir í fakfeløgunum fyri at arbeiðsgevarin kann stinga tey sosialu gjøldini í sín egna lumma.

Hansara fatan er kortini, at fæst eitt gott samskifti við arbeiðsgevararnar, fer í allarflestu førum at bera til at fáa viðurskiftini í rættlag.

# Samgongan hevur ikki hildið orð

**Higartil hevur samgongan ikki hildið orð, tá ið hon lovaðu okkum at seta lógir í gildið, sum tryggjaði neyvt eftirlit við teimum útlendingum, sum koma higar at arbeiða, sigur Ingeborg Vinther. Vit ætla avgjørt at seta neyðugt eftirlit í verk, sigur landsstýriskvinnan**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tá ið útlendingalógin varð broytt 1. juli, lovaði samgongan, at nakrar fylgilógir skuldi eisini setast í gildi fyri at tryggja, at útlendsk arbeiðsmegi, sum kom higar at arbeiða, ikki verða útnyttað, men kemur at arbeiða undir teimum treytum, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Men higartil hevur samgongan ikki hildið orð, staðfestir hon.

- Samgongan lovaði okkum, at tað skuldi bera til hjá fakfeløgum úti um landið at útvega sær lønarseðlar hjá arbeiðsfólki fyri at tryggja, at tey fingu lógarásettu lønina og at treytirnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum annars verða hildnar. Og annars vilja fakfeløgini hava innlit í, hvørjir fólk koma til landið og, hvar tey arbeiða.

- Útlendingastovan er í Havn og hevur ongan møguleika at kanna viðurskiftini kring landið og tí er tað neyðugt, at fakfeløgini fáa møguleikan at fylgja við og tað lovaði samgongan okkum, sigur Ingeborg Vinther.

Men higartil hevur hon ikki hildið orð, leggur hon afturat.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, staðfestir, at tað er vónleyst at hava eftirlit, tá ið fakfeløgini ikki vita, hvørjir arbeiðsgevarar fáa útlendska arbeiðsmegi til landið.

- Tað er ein stórur trupulleiki, staðfestir hann.

### Hava neyvt eftirlit

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, sigur, at ætlanin er at hava eftirlit við, at allar reglar verða hildnar.

Men hon staðfestir eisini, at nýstovnaða útlendingastovan má fáa møguleikan til at koma á føtur, áðrenn ov stór arbeiðsbyrða verður løgd á hana.

- Útlendingastovan hevur ikki meiri enn ein mánað á baki og starvsfólk eru akkurát sett, so hon hevur ikki virkað í meiri enn tvær vikur kanska. Hon hevur ikki so frægt sum fingið skrivstovu enn og tíansheldur hava tey fingið høvið til at seta seg inn í øll viðurskiftini.

Men Helena Dam á Neystabø sigur, at tá ið útlendingastovan er komin á føtur, fer hon at taka málið upp um, hvat eftirlit hon heldur, krevjast at verða sett í verk og, hvørji tiltøk eru neyðug at seta í verk fyri at tryggja eitt nóg gott eftirlit.

- Tað verður eitt tað fyrsta, hon fer undir, tá ið hon rættiliga er komin í gongd, leggur landsstýriskvinnan afturat.

Hon sigur, at endamálið við útlendingastovan varð nettupp at hava eftirlit við útlendskari arbeiðsmegi og tá ið hon rættiliga er farin at virka, fer hon at seta seg inn í, hvørji tiltøk, tað er hóskandi at seta í verk.

Helena Dam á Neystabø staðfestir eisini, at hetta er eitt arbeiði, sum skal gerast í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, so teir verða eisini tiknir við í myndina

Hon vónar at hetta arbeiðið kann fáast frá hondini í ár.